## Line-dansur í Eydnuni

**Nú Line-dansur er alt meir og meir at síggja við ymisk dansihøvir, skipar Eydnan á Oyrarbakka fyri skeiði í Line-dansi**

LINE-DANSUR

Skeiðið verður hildið fríggjadagin 22. apríl, sum er dýribiðidagur, og so leygardagin 23. Lagt verður soleiðis til rættis, at bæði tey, ið ikki hava lært dansitrin áður, og tey, ið hava lært at dansa frammanundan fáa væl burutúr. Og tey, sum eru víðari befarin fáa eisini væl burturúr, tí talan er um ein av fremstu undirvísarum í Line-dansi úr Danmark, Gitte Petersen.

Byrjað verður fríggjadagin seinnapartin, og hildið verður fram til nakað út á kvøldið. Byrjað verður aftur leygardagin og hildið verður fram til seint seinnapartin.

Sum endabrestur á tiltakinum, spælir dansiorkestrið Driv til dans leygarkvøldið.

## Hornkonsert á Glyvra skúla

KONSERT

Árliga musikkstevnan verður í ár í Klaksvík dýra biðidag. Einir 200 spælarar úr 8 orkestrum um alt landið møta til hesa stevnuna, sum má metast sum hæddarpunktið í tónleikaárinum hjá hornorkestrunum. Sum partur av fyrireikingunum til musikkstevnuna hava tey bæði orkestrini úr Eysturoynni felags konsert á Glyvrum sunnukvøldið kl. 18. Talan er um Fuglafjarðar Hornorkestur og Nes Sóknar Musikkfelag.

Á konsertini, sum verður í fimleikarhøllini í Glyvra skúla sunnudagin 10. apríl kl. 18, spæla orkestrini skránna, sum verður framførd á musikkstevnuni dýra biðidag, og talan er um blandað úrval av tónleiki, har eisini ungir solistar sleppa at royna seg.

Fuglafjarðar Hornorkestur varð stovnað í 1969. Í løtuni telur orkestrið 20 spælarar, og venjari og dirgentur er Kjeld Orseth.

Nes Sóknar Musikkfelag varð stovnað í 1962. Í løtuni eru 30 spælarar, og venjari og dirgentur er Ken Jones.

Konsertin endar við, at bæði orkestrini saman spæla 2 marsjir.

Heilsurenning:

# 113 komu á mál

**Heili 113 luttakarar gjøgnumførdu heilsurenningina í Klaksvík leygardagin, sum Shell í Norðoyggjum og Treysti skipaðu fyri. Ikki færri enn 130 fólk nýttu eisini høvið at máta sær blóðtrýstið hendan dagin**

HEILSA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Lydersen*

**Klaksvík:** - Eg eri sera glaður fyri at hava verið við til at skipa fyri einum slíkum tiltaki til frama fyri fólkaheilsuna, og eg má viðganga, at eg var púra ovfarin av stóru undirtøkuni. Veðrið var jú ikki av tí besta, sigur Niklas Heri Jákupsson, leiðari á Shellstøðini í Klaksvík. Hann leggur afturat, at Hjartafelagið, sum fleiri ferðir fyrr hevur mátað blóðtrýstið hjá fólki til slík tiltøk, ongantíð hevði havt so nógv at gera, sum hendan dagin í Klaksvík. Eisini Astma- og Allergifelagið var við og mátaði lunguorkuna hjá luttakarunum.



*Tað eydnaðist lastbilaføraranum, Jákup Ludvík Lydersen, at gjøgnumføra rennitúrin. Men blóðtrýstið aftaná gav honum nakað at hugsa um ...*

### Yvirhálaður av barnavogni

44 ára gamli Jákup Ludvík Lydersen, lastbilaførari úr Haraldsundi, var ein av teimum, sum rann styttra teinin. Jákup Ludvík hevði sett sær fyri at kanna, hvussu stóð til við konditiónini, eftir at hann seinastu 14 mánaðirnar stórt sæð bara hevur sitið á afturpartinum í førarahúsinum í lastbilinum, sum hann tekur til.

- Eg hevði gott mót at byrja við, men longu tá eg kom fram við Statoil støðini, føldist tað, sum eg rann í froskmannafitjum. Og tað var ikki beinleiðis stimbrandi fyri sjálvsálitið, tá eg løtu seinni bleiv yvirhálaður av einum manni við barnavogni. Tað kundi eg ikki hava sitandi á mær, so eg beit tennirnar saman og gjøgnumførdi. Tá var eg eisini meir deyður enn livandi, so eg kom á mál í berum treiskni, sigur Jákup Ludvík.

Rennitúrurin leygardagin hevur givið lastbilaføranum úr Haraldsundi nakað at hugsa um. Tað er als ongin ivi um, at nógvir lastbilaførarar hava ein sera ósunnan livihátt við lítlari rørslu og langum arbeiðsdøgum, og tað slepst ikki undan, at hetta gongur út yvir heilsuna, sum frá líður, sigur Jákup Ludvík.

- Eg havi ikki rættiliga mót uppá at byrja at renna enn, men nú havi eg roynt at gingið frá Com Data í Klaksvík til Haraldsund. Tað er ein teinur uppá 5 km, so tað er ikki so galið. Ein sjúkrasystir, sum var til heilsurenningina leygardagin, segði mær, at tað ger mun bara at ganga eini 500 m, so eg havi gott mót. Eitt er vist - skal eg halda fram sum lastbilaførari, má eg gera okkurt eyka fyri heilsuna, sigur Jákup Ludvík avgjørdur.



*Tað man vera sjáldsamt, at tað eydnast eini heilari familju at vinna heiðursmerki samstundis. Men her er familjan Biskopstø á sigursskamlinum, f.v: Karin, Emil, Borgar og Monika*

### Nýggja SISU og heiðursmerki

Tað var Shell-støðin í Klaksvík, sum saman við Treystinum skipaði fyri stóru heilsurenningini leygardagin. Hóast tað var bæði vindur og regn, forðaði tað ikki teimum 113 rennarunum í øllum aldri at gjøgnumføra kappingina, meðan ikki færri enn 130 fólk nýttu høvið at máta sær blóðtrýstið.

Tá rennarnir komu á mál fingu tey øll eina nýggja SISU frá Føroya Bjór. Eftir at úrslitini vóru greið, handaði Rani Nolsø, formaður í Heilsunevndini hjá Klaksvíkar býráð, vinnarunum í teimum ymsu bólkunum heiðursmerki. Eisini vórðu 3 gávukort til bensin og eitt Shell viðskiftakort á 1000 kr burturlutaði. Hepni vinnarin av viðskiftakortinum gjørdist John Havn úr Klaksvík.

Fyriskiparnir vóru so væl nøgdir við góðu undirtøkuna og tiltakið sum heild, at teir longu nú hava gjørt av, at næsta heilsurenning verður í Klaksvík leygardagin 13. august.



*113 luttakarar í øllum aldri gjøgnumførdu heilsurenningina í Klaksvík leygardagin*

# Fleiri enn 20.000 vitja Havnina í summar

**Ikki færri enn 35 útlendsk ferðamannaskip hava boðað frá, at tey ætla sær at vitja á Havnini í summar**

FERÐAVINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú tað gongur móti ljósari tíðum, nærkast vit eisini tíðini, har fremmand ferðafólk vitja landið. Ein stórur partur av teimum mongu ferðafólkunum, sum á hvørjum ári vitja her á klettunum, koma hagar við ferðamannaskipi og steðga bara heilt stutt í Føroyum.

### Nógv stór skip

Á skrivstovuni hjá Tórshavnar Havn verður upplýst, at tey hava fingið fráboðanir um 35 útlendsk ferðamannaskip, sum ætla at vitja høvuðsstaðin í summar.

Sagt verður, at nógv av hesum skipum eru rættuliga stór og hava nógv ferðafólk. Hvussu nógv ferðafólk, ið tilsamans koma á vitjan við hesum skipum, ber ikki til at siga heilt nágreiniligt, verður sagt á havnarskrivstovuni, men talan er um eitt tal, ið er væl oman fyri 20.000 ferðafólk.

Tað fyrsta ferðamannaskipið, ið kemur á vitjan, er Costa Allegra, ið kemur á Havnina tann 10. juni. Við tí skipinum verða fyrst og fremst ferðafólk úr Italia, og tey verða umleið 700 í tali.

Seinasta ferðamannaskipið, ið vitjar í ár, er Sea Princess, ið kemur 14. september, og tá verða nærum 2.000 ferðafólk umboð á stóra skipinum.



*Ikki færri enn 35 ferðamannaskip hava boðað frá, at tey koma á vitjan á Havnini í summar*

savnsmynd